Grønlandstíðindi Kári við Stein

**Grønlandstíðindi:**

# Rækjuprísurin lækkandi

**Kári við Stein greiðir frá, at rækjutrolari, har føroyski skiparin hevði frítúr, bjargaði tveimum monnum, niðurdotnir við flogfari, sum vóru fráboðaðir at vera deyðir. Annars greiðir Kári frá dag fyri dag**



**8. desember**
Akamalik kom inn í morgun at landa. Teir hava knapt 500 tons inni. Sum skilst er prísurin við at fara niður aftur líka skjótt, sum hann var á veg uppeftir. Polar Natoralik er inni í Nuuk og landar í dag.

Tað stendur at lesa í fjølmiðlunum, at ein kenningur her hjá okkum, trolarin Atlantic Enterprice, hevur bjargað tveimun monnum, sum vóru niðurdotnir við sínum lítla flogfari. Hendan túrin er Bo Basse skipari. Hin skiparin er William Hansen av Toftum, sum er heima fyri tíðina.

**9. desember**
Akamalik loysti tíðliga í morgun til nýggjan túr. Polar Nagtoralik er inni í Nuuk og landar. Hetta hevur verið ein óførur mánaði hjá teimum hóast fallandi prísir. Skipari og manning biður meg senda øllum heima á klettunum ynski um eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár við tøkk fyri árið, sum brátt er farið.

**10. desember**
Himmal og hav var í einum í morgun til seinnapartin. Tá var tað yvirstaðið. Qaqqatsiaq kom inn at landa í morgun. Teir hava fulla last inni. Bert síðan teir vóru inni seinast, er prísurin fallin einar 2 kr kilo. Fyri 500 tons er hetta nakað sum munar. Polar Nanoq er inni í Nuuk og leggur um til rækjur. Teir hava gott og væl 300 tons av svartkalva inni. Um teir leggja veiðuna upp havi eg onki hoyrt um. Markus er inni í Nuuk og landar, og tað sama er Regina C. Teir eru í Manitsoq og landa í dag.

**12. desember**
Polar Amaroq kom inn til Nuuk at landa í morgun. Lómur kom inn til Illulisat við gott 100 tonsum í morgun og sigldi aftur seinnapartin.




